# Væleydnað bátastevna í Vestmanna



*Øll familjan var á útferð hendan dagin*



*Allir bátarnir vórðu uppskrivaðir, tá teir løgdu at landi*



*Hugurin leitaði til grindarakstur, tá alt fylgið fór inn um Stíggin*

**Í besta veðri hildu vestmenningar bátastevnu leygardagin. Nógvir bátar luttóku, og heilt nógv fólk var í dansi um kvøldið. Alt gekk upp á stás, siga fyrireikararnir**

BÁTASTEVNA
*Orð: Edvard Joensen*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Vestmanna:**
Úr øllum landinum at kalla stevndu bátarnir til Vestmanna leygardagin. Hendan stevnan er onnur í røðini, og í ár vóru gott hálvthundrað bátar fleiri enn í fjør.

Teir komu serliga sunnaneftir, sigur ein av fyrireikarunum, Birgir Waag Høgnesen. Flestir úr Havn, men eisini úr Suðuroy, úr Skálavík og Skopun vóru fleiri. Onkur var úr Eysturoynni, men ikki nógvir úr Vágum.

Sagt verður úr Vágum, at har hava fólk helst hildið seg aftur orsakað av fiskasjúku, sum er í Vestmanna, men ikki í Vágum.

Birgir Waag Høgnesen sigur, at bátarnir hildu seg burtur frá alibrúkunum í Vestmanna júst við tí í huga ikki at spreiða sjúkuna.

Tað vóru 187 bátar skrásettir í Vestmanna hendan dagin, sigur hann. Og í dansi leygarkvøldið vóru umleið 900 fólk, sum tó ikki øll høvdu verið við til stevnuna um dagin kortini.

Stevnan byrjaði fyri Fútakletti á Vágalandinum, har flestu bátarnir hittust. Har lá gamli postbáturin Ólasvur klárur at sigla gomlu rutuna einaferð enn. Tá hildi varð, at allir bátarnir vóru komnir, legði Ólavur á Sundið við øllum fylginum afturút. Á halanum lá vaktar- og bjargingarskipið Tjaldrið, sum skuldi vera til at taka, um okkurt skuldi verið áfatt.

Tá fylgið var komið inn um streym á Vestmanna, legðist til. Tað vóru kappróðrarbátar og gomlu grindabátarnir úr Vági, sum kominir vóru norður um Fjørðin við Jóhonnu, ið nú komu uppí og róðu seinasta teinin inn a Vestmanna.

Fyrireikararnir høvdu skipað so fyri, at tey, sum við vóru, fingu ein bita í matarhøllini á Fiskavirking í Vestmanna. Umleið 650 fólk nýttu hendan møguleikan, sigur Birgir Waag Høgnesen.

Einki óvanligt hendi, og alt gekk upp á tað besta, hóast nógv fólk var savnað á havnarlagnum allan dagin og um náttina.

Tó so. Siga fyrireikararnir frá samarittunum hjá Reyða Krossi Føroya, sum vanliga eru við til slík stór tiltøk, so fóru tvey fólk niður í millum bátin og bryggjuna, men eingin skaði hendi, og tey vórðu beinaveg fingin uppaftur.



*Næstan 200 bátar síggjast aftur við bryggjuna*



*Sjálvandi flotaðu tey lokalu eisini ein slikan dag*



# Kirkjubøur býarpartur í Havn



*Kommunuskrivarin, grannskoðarin og eitt umboð fyri bygdarráðið taldu atkvøðurnar upp søguliga dagin á Velbastað*

**Ìbúgvarnir í Kirkjubøar kommunu søgdu greitt ja til samanlegging við Tórshavnar kommunu**

SAMANLEGGING
*Orð:Heri á Rógvi*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Leygardagin tóku fólk í Kirkjubøar kommunu støðu til, um tey vildu gerast partur av Tórshavnar kommunu. Kommunan telir bygdirnar Velbastað og Kirkjubø.

Dómurin hjá fólkinum var, at Kirkjubøar kommuna skal leggja saman við Havnini. 85 atkvøður vóru fyri og 53 ímóti. Hetta merkir sostatt, at fólk í Kirkjubø og á Velbastað verða partur av Tórshavnar kommunu.

Vallluttøkan var 95,8%, t.e. 138 av 144, sum høvdu valrætt, vóru á vali.

Kommunuskrivarin, grannskoðarin og eitt umboð fyri bygdarráðið taldu atkvøðurnar upp søguliga dagin á Velbastað. Og fólk fyldu væl við, og tey vistu úrslitið, áðrenn hetta alment varð kunngjørt.

Og lagið var gott, eftir at úrslitið gjørdist greitt. Fitt av lokalum kreftum vóru savnaði í skúlanum á Velbastað, sum hevði verið valstaður leygardagin.

- Hetta er tað besta upp á longri sikt og upp á styttri sikt, segði ein maður og hini rundanum vóru samd við honum.

Tað eru íløgurnar, sum standa fyri framman, sum serliga gera, at fólk hava hesa hugsan.

Tosað varð dúgligt, um tey, sum høvdu atkvøtt nei. Men nú kundi alt vera tað sama, tí fólkið hevði talað, og úrslitið var greitt.

Fólkið fegnaðist um úrslitið, sum var sum tey vildu hava tað. Onkir hugsaði, hvussu tað fór at vera at vaka upp sum havnafólk týsdagin.

## Deiligt

- Hetta var gott.

Bæði borgarstjórin og varaborgarstjórin í Kirkjubø frøddust óført leygarkvøldið, tá úrslitið var greitt.

Serliga borgarstjórin Annfinn Brekkstein lýsti sum ein sól, eftir at úrslitið gjørdist. Hann hevur verið fremsti talsmaður.

- Eg eri sera væl nøgdur. Fólkið hevur víst stóran áhuga og valt at fara frameftir heldur enn aftureftir, sigur Annfinn Brekkstein.

Eisini Eyðfinnur í Búðini var væl nøgdur.

- Hetta er tað rætta at gera. Hetta ger einki við okkara samleika. Vit eru tey somu, hóast vit eru partur av Tórshavnar kommunu, segði hann.

Tær báðir søgdu, at eitt sindur av trýsti hevði verið seinastu tíðina, og fólk høvdu verið ósamd.

- Men nú er alt gloymt, og vit hyggja frameftir, sigur Annfinn Brekkstein.

## Sáttmálin undirskrivast

Ein sáttmáli er gjørdur millum Kirkjubøar kommunu og Tórshavnar kommunu saman við einum fylgiskjalið, sum ásetur hvussu samanleggingin skal fara fram. Fylgiskjalið er sambært borgarstjóranum í Havn málsetningarnir, men tað er ikki juridiskt bindandi sum sáttmálin, men kortini moralskt bindandi, og tað er ætlanin at fylgja hesum, leggur Jan Christiansen eina við.

Sáttmálin varð undirskrivaður, eftir at blaðið var farið til prentingar. Àðrenn undirskriftirnar vórðu settar á sáttmálan, so hevði bygdarráðið tikið endaliga støðu á fundi fyrr um dagin.

Borgarstjórin í Havn verður umboð hjá Tórshavnar kommunu til bygdarráðsfundir í Kirkjubøar kommuna, og Kirkjubøar kommuna fær umboð í allar nevndirnrar hjá býráðnum í Havn. Felags fyri øll hesi er, at tey hava talurætt, men ikki atkvøðurætt.

Formelt hava kommunurnar hvør sína fíggjarætlan komandi ár, men tað verður arbeitt sum um, at tær eru saman í einari kommunu, har pengarnir verða játtaðir í Havn til barnagarð á Velbastað. Endiliga samanleggingin merkist fyrst við kommunuvalið á heysti 2004, og endiliga samanleggingin verður 1. januar 2005.



*Fitt av fólki var komið saman í skúlanum fyri at fylgja uppteljingini av fólkaatkvøðuni. Hesi søgdu at kalla øll ja. Tey, sum valdu nei, vóru ikki í skúlanum*



*Borgarstjórin Annfinn Brekkstein hevur verið fremsti fortalarin fyri samanlegging. Tað lætnaði eisini hjá honum, tá úrslitið gjørdist greitt*

# Púra natúrligt

**-Vit mugu ikki tosa um hetta sum keyp og søla. Hetta er ein púra natúrlig gongd, sum gagnar øllum pørtum, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn**

SAMANLEGGING
*Heri á Rógvi*

Bygdarráðið í Kirkjubø og býráðið í Havn vóru bæði púra samd um at taka undir við einari samanlegging millum Tórshavn og Kirkjubø.

- Hetta er ein púra natúrlig gongd. Geografiskt er hetta upplagt, soleiðis at alt Suðurstreymoy er savnað í eina kommunu. Samstundis er hetta eisini upplagt, tá hugt verður eftir, hvørjar uppgávur kommunurnar fáa í framtíðini, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn.

Tosað hevur verið um, at hetta minnir um ein handil, har Tórshavn fær lendi fyri ein barnagarð. Men borgarstjórin vísir hesum prátinum aftur.

- Vit mugu ikki tosa um hetta sum keyp og søla. Hetta er ein púra natúrlig gongd, sum gagnar øllum pørtum.

Men fólk í Kirkjubøar kommuna fáa ein nýggjan barnagarð innan leingi.

- Vit hava sett okkum sum mál at nøkta barnaansingartørvin í hesum valskeiðinum, og hetta skal eisini galda fyri Velbastað og Kirkjubø, sigur Jan Christiansen.

Ein barnagarður og vøggustova til umleið 60 børn skal byggjast. Pláss skal eisini vera fyri einari rørsluhøll, sum samstundis kann fara bygdarhús. Og Jan Christiansen sigur, at hetta eru bygdir og ikki býlingar.

Eisini skulu aðrar íløgur gerast í Kirkjubøar kommunu í næstum. Umstøðurnar skulu vera líka fyri øll í Tórshavnar kommunu, sigur Jan Christiansen, og hetta er sjálvsagt eisini galdandi vestanfyri, sigur hann. Hetta merkir millum annað, at munandi ábøtur verða gjørdur við vatnveitingarnar í Kirkjubø og á Velbastað.

Fíggjarliga heldur Jan Christiansen ikki, at Tórshavnar kommuna stendur verri í tí orsakað av samanleggingini.

- Kirkjubøar kommuna er ikki illa fyri. Hon skyldar minni enn eina álíkning og hevur góðar skattgjaldarar, sigur Jan Christiansen.

- Ein triðingur av borgarunum eru børn, og hetta skapar ein tørv, sum Kirkjubøar kommuna ikki kann loysa við verandi íløgukarmi og umstøðum at taka lán, men har kunnu vit koma inn, tí vit hava møguleikar at gera íløgur, sigur Jan Christiansen.

Íløguloftið hjá Tórshavnar kommunu hækkar tilsvarandi við umleið 900.000 kr. eftir samanleggingina



*Jan Christiansen og Annfinn Brekkstein mugu helst deilast um heitið sum høvdingur í Kirkjubøar kommuna. Borgarstjórin í Havn var eisini á Velbastað leygarkvøldið.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

